FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 07.07.2024
J. nr. (MEGD): 704-3-2024

# ÍKAST FRÁ SIVILSAMFELAGNUM Í FØROYUM TIL BREKRÆTTINDANEVNDINA HJÁ ST 2024

**Innleiðing**

Føroyar eru sjálvstýrandi tjóð undir uttanhýsis ræði hjá danska kongsríkinum. Føroyar hava ræðið at lóggeva og stjórna sjálvstøðugt innan eina langa røð av økjum, herundir almannatrygd, arbeiðsmarknaðin, mentan, útbúgving, heilsu, skattaviðurskifti, vinnulív, orku, samferðslu, samskifti og gransking. Umsitingin av rættindum hjá fólki, sum bera brek, er lutvíst býtt millum teir 9 geirarnar og tær 29 kommunurnar.

Ein avtala millum Føroyar og Danmark, sum er skrivað í lóggávu, gevur Føroyum sjálvræði í uttanríkisviðurskiftum. Føroyar hava limaskap í eini røð av altjóða felagsskapum, men eru ikki limir í ES. MEGD er einasta meginfelagið fyri fólk, ið bera brek, í Føroyum, og tilsamans eru 24 limafeløg. MEGD er sjálvstøðugt meginfelag, sum luttekur í altjóða samstarvi saman við meginfeløgum fyri fólk, sum bera brek, í øðrum londum.

**Samandráttur**

At síggja til tykjast føroyskir myndugleikar at taka í álvara viðurskifti, sum viðvíkja fólki, ið bera brek, men lívsroyndir og fakligar greiningar hjá umboðandi feløgum geva ábendingar um, at Føroya landsstýri grundleggjandi og áhaldandi byggir sínar mannagongdir og sjónarmið á eina samanrenning millum gamlar fatanir av hugtakinum *brek*, ið byggja á heilivág, sjúkugreining og olmussu.

Tí standa fólk, ið bera brek, í Føroyum framvegis við stóru avbjóðingini at tryggja, at landsins myndugleikar skjótast gjørligt velja at leggja um til eina skipaða *menniskjarættindatilgongd*, og at viðkomandi mannagongdir, hugburður og háttaløg verða ment fyri at tryggja rættvísi og umsiting av rættindum hjá fólki, ið bera brek, bæði formliga umvegis lóggávu og í veruliga lívinum.

Í grundini eru tvær høvuðsorsøkir til hetta. Onnur er grundarlagið fyri *menniskjarættindatilgongd* í Føroyum, sum ikki er dagført, og hin er ógreitt og ofta villeiðandi samskifti millum altjóða brekrættindanevndina hjá ST og danska kongsríkið, harundir føroyskar myndugleikar og føroysk feløg.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Grundarlagið fyri menniskjarættindavernd, sum ikki er dagført, og sum føroyskir myndugleikar tó fylgja í sínum dagliga arbeiði, t.e. í lógarsmíði, mannagongdum, hugburði, avmarkaðum tilfeingi o.s.fr., økja um sannlíkindi fyri, at nýggj lóggáva ikki virðir, verjir ella stuðlar rættindi hjá fólki, sum bera brek í nøktandi mun. Fyrsta stigið hjá landsmyndugleikunum eigur tí at vera at innlima sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek í føroyska lóggávu.

Tað hevur eins stóran týdning, at samstarvið millum ríkismyndugleikar og umboðandi feløg verður styrkt grundleggjandi, lutvíst við at menna betri og effektivari mannagongdir fyri hoyringum og luttøku í lógargerð og lutvíst við at økja um tøka starvsfólkatilfeingið hjá báðum pørtum.

Harumframt er framvegis eingin langtíðar brekpolitisk virkisætlan, sum er gjørd í samstarvi við umboðandi feløg. Hóast nakrar ábøtur eru gjørdar seinastu tíggju árini, eitt nú í mun til nýggja almannalóg, hevur manglandi dagførda grundalagið fyri menniskjarættindavernd forða fyri veruligum betringum, og harumframt eru nøkur dømi um at rættindi verða niðurlagað.

Onnur høvuðsorsøkin til, at føroyskir ríkismyndugleikar framvegis ikki fylgja menniskjarættindatilgongdini, er óivað grundað á háttalagið í samskiftinum frá brekrættindanevndini hjá ST og danska kongsríkið. Hóast Føroyar formliga eru ein partur av danska kongsríkinum, so eru ómetaliga stórir munir í veruliga lívinum til dømis í mun til lóggávu, politikk, mál, mentan, landafrøði, búskap o.s.fr. Hesir munir eru helst orsøkir til, at føroyskir stjórnarmyndugleikar og føroysk umboðandi feløg ikki hava viðgjørt eygleiðingar frá brekrættindanevndini hjá ST til danska kongsríkið, sum ikki beinleiðis og staðiliga vísa til ella nevna Føroyar.

Í teimum førum, har Føroyar eru staðiliga nevndar, eru samstundis bert nøkur ávís viðurskifti viðgjørd, og tíverri eru ymsar møguliga álvarsligar eygleiðingar ikki viðgjørdar. Hetta skapar djúpar gjáir og munir millum Danmark og Føroyar viðvíkjandi, hvussu fólk, ið bera brek, verða vard av rættindum.

Sum partur av frágreiðingini frá danska kongsríki til ST verða bæði Føroya landsstýrið og umboðandi feløg í Føroyum munandi avmarkað í orðatali í sínum frágreiðingum til brekrættindanevndina hjá ST, hetta hóast lógarviðurskiftini í Føroyum eru í minsta lagi eins fjøltáttað og samansett, sum tey eru í Danmark. Hetta merkir, at møguligar álvarsligar menniskjarættindaavbjóðingar í Føroyum ikki eru viðgjørdar í frágreiðingunum og samskiftinum við brekrættindanevndina hjá ST.

Avleiðingarnar eru millum annað, at føroyskir myndugleikar bert í sera avmarkaðan mun taka atlit til møguligar avleiðingar av eitt nú stovnsgerð í ætlanum teirra um at byggja stórar stovnar og at umskipa sosialu tænasturnar til fólk, sum bera brek. Føroyar hava sottatt eina lóggávu, har brekrættindasáttmálin ikki er innlimaður, vit hava onga landsfevnandi brekpolitisk virkisætlan, ikki nøktandi arbeiðskarmar og avmarkað starvsfólkatilfeingi. Sostatt eru rættindini hjá fólki, sum bera brek, í vanda fyri at verða ávirkað neiliga komandi árini, eitt nú av vaksandi stovnsgerð (*institutionalisering*) og niðurlaging av verandi rættindum.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

## A. Endamál og skyldur (Grein 1-4)

### 1. Almennar skyldur (4. grein): Landsfevnandi brekpolitisk virkisætlan

15 ár eftir at sáttmálin varð samtyktur, eru Føroyar framvegis uttan eina langtíðar landsfevnandi brekpolitisk virkisætlan, sum bæði er fíggjað og bindandi. Royndir vísa rættiliga greitt, at avleiðingin er, at vit síggja eina óhepna, mangan tilvildarliga og seina menning av brekøkinum í Føroyum.[1] Uttan eina landsfevnandi brekpolitisk virkisætlan, sum setur mál, politikk, indikatorar og standardir fyri myndugleikarnar, er framvegis trupult at vísa við vissu, í hvønn mun framgongd, niðurlaging ella tilvildarlig afturgongd eru í stríð við sáttmálan.

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*gera eina landsfevnandi brekpolitiska virkisætlan saman við umboðandi feløgum hjá fólki, ið bera brek.*[2]

### 2. Almennar skyldur (grein 4): Íverkseta (inkorporera) brekrættindasáttmálan sum lóg

Brekrættindasáttmálin er ikki íverksettur (inkorporeraður) sum lóg í Føroyum og er tískil ikki beinleiðis galdandi lóg í Føroyum. Í ljósinum av seinu gongdini at íverkseta og útinna sáttmálan í innlendis lóggávu, sum lýst er í A.1, hava feløgini, ið umboða fólk við breki, í samsvari við tilmæli frá brekrættindanevndini, [3] tí mælt til at íverkseta sjálvan sáttmálan sum lóg í Føroyum fyri á tann hátt at skunda undir gongdina at fremja rættindini úr sáttmálanum og yvir í føroyska lóggávu.

Danska stjórnin hevur ógrundaðar stúranir um, at ein møgulig íverksetan av sáttmálanum fer at skeikla valdsjavnvágina,[4] og at íverksetanin av sáttmálanum ikki er so týdningarmikil.[5] Víst verður til serfrøðinganevndina, sum í 2014 viðgjørdi spurningin um íverksetan av fleiri sáttmálum, har størsti einstaki bólkurin av serfrøðingum ikki hevur somu stúranir, sum danska stjórnin.[6]

---

[1] Avbjóðingarnar eru millum annað manglandi almenn og tvørgangandi lóggáva móti mismuni, sum er galdandi uttan fyri arbeiðsmarknaðin; manglandi lóggáva á arbeiðsmarknaðinum um skyldurnar at fremja rímiligar tillagingar; manglandi eftirlit sambært grein 33, stykki 2; skerjingar á almennu fíggjarlógini, sum gera støðuna verri hjá teimum, ið bera brek, t.d. lækkaður stuðul til keyp av heilivági, avtøka av stuðli til keyp av avlamisbili og uppskot, um at skerja útbúgvingarstuðulin til fólk, sum bera brek; brádligar, umfatandi og órímiligar bústaðarleiguhækkingar; og manglandi ráðføring og hoyringar við umboðandi felagsskapir.

[2] Áseta ítøkilig mál, ið kunnu mátast, umframt hóskandi fíggjarætlanir og indikatorar til at meta um gongdina í at fremja ætlanirnar hjá landsstýrinum í samsvari við tilmæli nr. 9 frá brekrættindanevndini til danska kongsríkið frá 2014.

[3] Tilmæli nr. 13 frá brekrættindanevndini til danska kongsríkið frá 2014.

[4] Combined second and third periodic reports submitted by Denmark under article 35 and the Convention, due in 2020. Sí reglubrot 340.

[5] Report on incorporation etc. in the field of human rights. Betænkning nr. 1546, Justitsministeriet, 2014. Síða 255 og fram.

[6] Sama kelda sum áður. Serfrøðingarnir síggja harafturímóti stórar fyrimunir við íverksetan av sáttmálanum sum lóg, millum annað súmbolvirðið og økta tilvitan um týdningin av sáttmálunum í samfelagnum, og betri lógarvernd yvirhøvur, nakað sum Føroyar veruliga hava brúk fyri, tá hugsað verður um seinu gongdina við at fremja rættindi sambært sáttmálanum í føroyskari lóggávu. Sí eisini A.1.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*stuðla undir, at brekrættindasáttmálin skjótast gjørligt verður íverksettur í føroyska lóggávu samsvarandi tilmæli brekrættindanevndarinnar frá 2014 (nr. 13).*

**3. Almennar skyldur (grein 4): Vantandi hoyringar**
Líka síðan sáttmálin varð samtyktur í Føroyum hevur tað verið ein afturvendandi trupulleiki, at myndugleikarnir ikki í nóg stóran mun ella á nóg skipaðan hátt hava hoyrt ella leitað sær ráð hjá feløgum, ið umboða fólk, ið bera brek, í sambandi við lógarsmíð, at orða politikkir og í viðkomandi avgerðartilgongdum. Hetta er í stríð við grein 4, stykki 3, í sáttmálanum.[7]

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*tryggja og skipa skylduna sambært sáttmálanum at hoyra umboðandi feløg og ráðføra seg við hesi í sambandi við at fremja rættindi í lóggávu og politikki.*

**B. Serlig rættindi (Greinar 5-30)**

**1. Javnrættindi og eingin mismunur (Grein 5)**

**1.1 Almenn tvørgangandi lóggáva**
Hóast tilmæli kom frá nevndini í 2014 (nr. 15), hevur Føroya landsstýri enn ikki tikið ítøkilig stig til at seta í verk almenna og tvørgangandi lóggávu móti mismuni vegna brek, sum víðkar verjuna út um arbeiðsmarknaðin.[8]

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*samtykkja eina almenna, tvørgangandi lógarverju móti mismuni vegna brek, sum víðkar verjuna út um arbeiðsmarknaðin sum eisini inniheldur ásetingar um at fremja rímiligar tillagingar í samsvar við tilmælini frá sáttmálanum frá 2014 (nr. 15).*

---

[7] Bæði raðfestingin og tilvitanin um hesa sáttmálaskyldu tykjast sum heild at vera ov avmarkað, bæði í landsstýrinum, undirskipaðum stovnum og í kommununum. Til dømis hevur tað verið ein almennur trupulleiki, at lógaruppskot, sum fylgja við fíggjarlógaruppskotum hjá landsstýrinum, sum hava neiliga ávirkan á fólk, sum bera brek, verða løgd fyri Føroya løgting uttan samráðingar við umboðandi feløg á brekøkinum. Eisini hava verið avbjóðingar á sosiala økinum í mun til vantandi ráðførslu við feløg, samráðingar og hoyringar, t.d. í sambandi við heildarætlanir um útbygging av heimum/stovnum til fólk, ið bera brek.

[8] Sama kelda sum í fótnotu 4. Í 2. og 3. frágreiðing frá Danmark til brekrættindanevndina fyri 2020 vísti føroyska stjórnin á, at tað hevði ongar ítøkiligar ætlanir um at samtykkja eina almenna lóg móti mismuni vegna brek, sí reglubrot 345, sum er í stríð við grein 5, lisið saman við grein 4. Núverandi stjórn í Føroyum hevur boðað frá at hon ætlar at endurskoða og møguliga breiðka galdandi javnstøðulóg, sum vónandi fer at føra til, at fólk, ið bera brek, verða tikin við og fáa betri lógarvernd móti mismuni. Ein almenn lóg móti mismuni fer at hava stórt signalvirði og skapa økta tilvitan millum myndugleikar og alment um týdningin av at seta sáttmálan í verk.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

**1.2 Lógin um at banna mismuni vegna brek á arbeiðsmarknaðinum**

Lógin, sum bannar mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna brek,[9] virkar ikki sambært endamálinum. Síðani lógin varð samtykt í 2011 hevur avvarðandi kærustovnur, Javnstøðunevndin, bert fingið eina kæru.[10] Tilvitanin og nýtslan av lógini er avmarkað serliga orsakað av manglum í lógini og vantandi vitan og fakligum førleikum.[11]

***Føroya landsstýri verður biðið um***

*saman við umboðandi feløgum at eftirmeta galdandi lóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum.*

**2. Kvinnur, ið bera brek (grein 6)**

Føroya landsstýri lat í 2023 gera eina nýggja heildarverkætlan, sum hevur til endamáls at fyribyrgja harðskapi í parløgum og nærsambondum.[12] Hóast umboðandi felagsskapir fyri fólk, sum bera brek, luttóku á hoyringarfundi um heildarverkætlanina og lótu inn hoyringarskriv, so nevnir heildarverkætlanin hvørki kvinnur ella fólk, sum bera brek.[13]

***Føroya landsstýri verður biðið um at***

*tryggja, at arbeiðið hjá myndugleikunum at fyribyrgja harðskapi í parløgum og nærsambondum verður lagað til at fevna um fólk, serliga kvinnur, sum bera brek.*

**3. Børn, ið bera brek (grein 7)**

Føroya landsstýri hevur nýliga tikið stig til fyrireikingar, sum eftir ætlan fara at føra til, at ein barnalóg í nærmastu framtíð verður gjørd við støði í tvørgangandi verkætlanini *Barnaverkætlanin*[14] við tí endamáli at samskipa tvørgangandi vælferðartænastur og tænastur til børn og ung. Higartil hava feløg fyri fólk, sum bera brek, bert luttikið í avmarkaðan mun, og børn og ung, sum bera brek, hava ikki verið við. Uttan eina landsfevnandi brekpolitisk virkisætlan og serkøn starvsfólk, sum tryggja umboðan og luttøku, verður trupult at finna góðar, rættvísar og tilrættalagdar loysnir fyri hendan samfelagsbólkin og avvarðandi teirra.[15]

---

[9] Løgtingslóg nr. 63 frá 26. juni 2011 um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.

[10] Sí avgerðarsavnið hjá Javnstøðunevndini [www.javnstoda.fo/avgerdasavn]

[11] Sí viðmerkingar um grein 27 um arbeiði og starvssetan. Sí B.12.

[12] Heildarverkætlan *Harðskapur í parlagøgum og nærsambondum*, Almanna og Heilsumálarálaráðið, 2023

[13] Hetta er ein sera álvarsligur trupulleiki, tí royndir, altjóða hagtøl og kanningar vísa, at kvinnur, sum bera brek, orsakað av teirra breki, eru serliga viðkvæmar í mun til harðskap í parlagi og nærsambondum, og at fólk, sum bera brek, hava rætt til tillagað samskifti til tess at vera javnbjóðis og fult inkluderað.

[14] *Barnaverkætlanin* er eitt samstarv millum Barna- og Útbúgvingarmálaráðið, Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið og Kommunufelagið.

[15] Til dømis mangla skipað átøk at fyribyrgja, at børn fáa psykososial brek; at børn mugu bíða upp til 2 ár fyri at fáa psykososiala viðgerð; at brek hjá børnum verður staðfest ov seint ella als ikki; at børn mugu flytast uttanlands til sjúkraviðgerð vegna teirra brek; og at børn við mentalum breki ikki fáa nóg mikið av stuðli til at menna kognitivar og samskiftisførleikar, serliga tí at vælferðartænastur ikki verða bjóðaðar børnum við serligum diagnosum. Í apríl 2023 góvu meginfelagið MEGD og tey 24 limafeløgini fyri fólk, ið bera brek, í Føroyum, út eina felags yvirlýsing, ið staðfestir at feløgini áhaldandi eru vitni til, at rættindini hjá børnum, ið bera brek, ov ofta ikki verða vard.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*menna viðkomandi vitan, førleikar og tilfeingi til áhaldandi at fáa umboðandi feløg hjá fólki, sum bera brek, at luttaka í at menna og betra um viðkomandi tvørgangandi tænastur og veitingar til børn og ung, sum bera brek.*

**4. Tilvitskustimbran (grein 8)**

**4.1. Myndugleikarnir**
Myndugleikarnir eru ikki nóg tilvitaðir um skyldurnar at hoyra og ráðføra seg við felagsskapir hjá fólki, ið bera brek. Hetta kemst í stóran mun av avmarkaðari vitan, serkunnleika og áhuga í brekøkinum hjá politikarum og almennum starvsfólki yvirhøvur.[16]

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*vera við til at tryggja, at avvarðandi myndugleikar og fakfólk fáa neyðuga upplæring og útbúgving til at skilja brekrættindasáttmálan.*

**4. 2. Landsumfevnandi public service tænastur**
Landsfevnandi public service tænasturásin, Kringvarp Føroya, hevur enn ikki útbúgvið tíðindafólk síni innan brekviðurskifti og brekrættindi.[17]

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*seta tiltøk í verk fyri at tryggja, at tíðindafólk hjá Kringvarpi Føroya fáa neyðugu upplæringina í at skilja brekrættindasáttmálan og menniskjarættindi yvirhøvur.*

**5. Atkoma (grein 9)**

**5.1 Almenn samferðsla**
Bussar eru sum heild atkomuligir, men fleiri avbjóðingar eru við tilhoyrandi amboðum so sum busssteðgistøðum, gongubreytum, gonguteigum og rampum.

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*tryggja, at øll almenn samferðsla og amboð, eisini privatir veitarar sum Bygdaleiðir (bussleiðir),[18] lúka atkomukrøv, og at ein yvirskipað atkomuætlan verður samtykt í samsvari við tilmæli nevndarinnar frá 2014.*

---

[16] Umframt grein 8 um kunning eru eisini grein 4 og grein 33, stykki 1, um samskipandi funktiónina hjá miðfyrisitingini viðkomandi ásetingar í hesum sambandi.
[17] Umframt grein 8, grein 4 og grein 21 um talu- og meiningsfrælsi og atgongd til upplýsingar eru viðkomandi sáttmálaásetingar í hesum sambandi.
[18] Bygdaleiðir er almenna bussnetið í Føroyum og verður dagliga rikið av privatum fyritøkum.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

**5.2 Talgilding og Talgildu Føroyar**
Tørvur er á vitan um talgilda atkomu í Føroyum. Uttan nøktandi tilfeingi, vitan og heildarætlanir um menning av talgildari atkomu, fer hetta sannlíkt at ávirka fólk, ið bera brek, í Føroyum.

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*víðari menna viðkomandi vitan og gera eina ætlan fyri at menna talgilda kunningarsamfelagið, soleiðis at tað verður atkomuligt fyri øll og í samsvari við altjóða standardir á økinum.*[19]

**5.3. Public service rásin Kringvarp Føroya**
Í dag hava fólk við niðursettari hoyrn og deyv sera avmarkaða atgongd til beinleiðis tíðindasendingar, sum ikki eru tekstaðar fyrr enn seinni um kvøldið. Børn, sum nýta alternativt ella lættlesiligt samskifti, hava eisini tørv á barnasjónvarpssendingum, og sjónvarpssendingar yvirhøvur taka sera avmarkað atlit til blind og sjónveik, til dømis tá ið víst verður til myndir og grafikk.
***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*tryggja, at allar føroyskar sjónvarpssendingar í Kringvarpi Føroya eru atkomuligar hjá fólki við niðursettari hoyrn, deyv, blind ella fólki við menningartarni við at broyta viðkomandi lógarkarmar, fyrst og fremst við at tilskila í lógini um kringvarp*[20] *skylduna at tryggja fólki við breki góða atkomu til sendingar í Kringvarpi Føroya.*

**6. Vandastøður og menniskjaslig neyðstøða (grein 11)**
Tað er eingin landsfevnandi vanlukku- ella tilbúgvingarætlan í Føroyum, sum fevnir um verju av fólki, ið bera brek.

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*tryggja, at landstilbúgvingin áðrenn, undir og eftir vanlukku fevnir um fólk, ið bera brek.*

**7. At liva sjálvstøðugt og verða tikin upp í samfelagið (grein 19)**

**7.1 Stúran fyri stovnsgerð**
Frágreiðingin *Í góðum hondum*[21] frá 2022 lýsir, hvussu føroyskir myndugleikar komandi árini fara at standa fyri starvsfólkatroti og øktum útreiðslum á vælferðarøkinum. Sosialu myndugleikarnir ætla tí at loysa hesar avbjóðingar við eini røð av átøkum og loysnum, sum helst fara at føra til økta stovnsgerð (institutionalisering), eitt nú av heimum og tænastum til persónar, sum bera brek. Hetta fer at avmarka rættindi teirra til sjálvstøðugt lív og til at luttaka í samfelagnum. Hetta sæst m.a. aftur í ætlanum hjá almannamyndugleikunum at byggja eina røð av stórum stovnum til fólk, sum bera brek.[22]

[19] Sí nærri kunning um *Web Content Accessibility Guidelines* (WCAG).
[20] Løgtingslóg nr. 61 frá 2006 um kringvarp
[21] www.uvmr.fo/fo/kunning/tidindi/framloega-av-fragreidingini-i-godum-hondum
[22] Sama kelda sum áður. MEGD hevur fingið innlit í eitt innanhýsis arbeiðsrit, Í góðum hondum 2, frá myndugleikunum, sum nærri lýsir hesar ætlanir um at byggja stórar stovnar. Veruligi týdningurin og ávirkanin av hesum arbeiðsriti vórðu staðfest á



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Búskaparligi frymilin, ið liggur til grund fyri frágreiðingina *Í góðum hondum*, tykist í besta føri einans at geva eina stutttíðarmynd og tykist tíverri ikki at vísa langtíðar búskaparliga landslagið, eitt nú viðvíkjandi heilsu, útbúgving, arbeiðsmarknaðinum og sosialum tænastum. Felagsskapir, sum umboða fólk, ið bera brek, hava sum heild ikki verið við í frágreiðingini og eru annars í avmarkaðan mun hoyrd. Harumframt hava umboðandi felagsskapir gjørt myndugleikar varugar við týðandi og umfatandi gransking, sum ávarar ímóti stovnsgerð og byggja stór heim.

Hóast feløgini áhaldandi hava biðið um gransking, sum prógvar, at stór heim eru góð fyri persónar, sum bera brek ella starvsfólk, so hava myndugleikarnir higartil ikki lagt fram nakra viðkomandi gransking. Hetta bendir á, at menningin av tænastum og heimum til fólk, sum bera brek, ikki er væl grundað við virðing fyri tign teirra, og sum kundi vart tey móti stovnsgerð. Hetta er í beinleiðis stríð við grein 19 í brekrættindasáttmálanum.

***Føroya landsstýri verður biðið um at***

a. *tryggja við lóggávu, at fólk, sum bera brek, grundað á eina landsfevnandi brekpolitiska virkisætlan, hava rætt til eitt gott og sjálvstøðugt lív, við hóskandi og ráðiligum bústøðum og við rímiligum persónligum hjálpartænastum, bæði innan og uttan fyri heim teirra.*
b. *tryggja, at viðkomandi faklig vitan á byggi- og arkitekturøkinum verður ment sambært eini landsfevnandi brekpolitisk virkisætlan.*
c. *tryggja, at myndugleikarnir menna ein búskaparligan frymil, sum kann nýtast til at rokna langtíðar avleiðingarnar av stovnsgerð, eitt nú í mun til áhaldandi og vaksandi kostnaðir fyri t.d. fíggjarligar veitingar, fyritíðarpensjónir, endurvenjing, viðlíkahaldsvenjing, menning, heilivág, samskiftismenning ella vælferðartænastur, sum hava týdning fyri heilsu og trivnað hjá bæði fólki, sum bera brek, og familjum teirra.*

### 7.2 Bústaðir og kommunur

Hóast kommunurnar hava havt lógarskyldu[23] síðan 1. januar 2015 at taka sær av fólki, ið bera brek, sum eru 67 ár og eldri, so er framvegis stórur mangul á at byggja nýggjar bústaðir til hendan málbólkin. Trot er á bústøðum til hendan bólkin, og avleiðingarnar eru bæði umfatandi og álvarsligar og vaksa hvønn dag.[24]

---

afturlatnum fundi við myndugleikarnar 25. juni 2024. Gjøgnumskygni manglar í hesum máli, og aðrar almennar keldur eru tí truplar at geva í hesi frágreiðing.

[23] Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.

[24] Sjúklingar kunnu ikki vera útskrivaðir av Heilsuverkinum, tí teir megna ikki at fara heim; fólk, sum bera brek, sum búgva í almennum bústøðum, mugu búgva á sama stað eftir 67 ára aldur; harumframt vaksa bíðilistar til bústað til tey eldri enn 67 ár, og tey, sum eru yngri enn 67 ár, tykjast at vera í ongamannalandi, og kunnu í stóran mun verða gloymd og rættindaleys; kommunur hava framvegis ongar ætlanir um at byggja bústaðir til fólk, ið bera brek, so framtíðin hjá hesum bólki er ørkymlandi.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

***Føroya landsstýri verður biðið um***

a. *skjótast gjørligt at avtala og útgreina, við støði í eini landsfevnandi brekpolitiskari virkisætlan saman við kommunum og sivilsamfelagnum, grundarlagið at byggja eitt rímiligt tal av nýggjum bústøðum til fólk, ið bera brek, sum eru 67 ár og eldri.*[25]

b. *at byrja at byggja nýggj heim til fólk, ið bera brek, sum eru 67 ár og eldri sum skjótast.*

**8. Talufrælsi, meiningarfrælsi og atgongd til upplýsingar (grein 21)**

Tað er eingin landsfevnandi brekpolitisk virkisætlan fyri, hvussu børn í skúlunum, starvsfólk og umstøður skulu mennast fyri at tryggja, at børn og ung, ið bera brek, kunnu menna samskiftisførleikar á jøvnum føti við onnur. Harumframt hava fleiri umboðandi felagsskapir upplivað, at ráðgevingin hjá landsstovninum Sernám er ov illa samskipað við skúlar, barnagarðar og dagstovnar. Hetta elvir til eina ónøktandi tænastu til eitt nú næmingar við Down syndromi, autismu og CP.[26] Enn mangla teknmálstulkar, útbúgvingar og skipanir, sum tryggja, at teknmálið røkkur til avvarðandi stovnar.

***Føroya landsstýri verður biðið um at***

a. *gera eina landsfevnandi brekpolitiska virkisætlan fyri, hvussu skúlar, starvsfólk og umstøður annars skulu mennast og tillagast fyri at tryggja nøktandi samskiftismenning fyri allar næmingar, ið bera brek í fólkaskúlanum og í serskúlanum.*

b. *dagføra og laga viðkomandi lógir til skjótast gjørligt, soleiðis at landsráðgevandi stovnurin fyri samskiftismenning, Sernám, hevur betri lógargrundarlag, serkunnleika og tilfeingi til at menna samskiftisførleikar og tilvitskuna hjá børnum, sum bera brek.*

c. *útbúgva fleiri teknmálstulkar og vegleiðarar.*

**9. Útbúgving (grein 24)**

Endamálið við at fáa øll við í útbúgvingarskipanina[27] er ikki rokkið millum annað tí, at lóggávan bert í avmarkaðan mun tryggjar veruliga inklusjón, tí eingin landsfevnandi brekpolitisk virkisætlan er, og sum heild mangla fakligir førleikar og skipanir fyri hoyringar til dømis í mun til at laga til mannagongdir innan undirvísing, próvtøkur ella sjúkrafráveru.

***Føroya landsstýri verður biðið um at***

*gera nágreiniligari lóggávu um at taka næmingar, sum bera brek, inn í fólkaskúlan, miðnám og hægri útbúgvingar við nøktandi stuðli og bústaði, serliga við nøktandi útbúgving til lærarar og onnur starvsfólk í útbúgvingarskipanini.*

[25] Brekpolitiska virkisætlanin eigur at vera langsiktað og samskipað millum avvarðandi geirar og umboðandi felagsskapir og skal vera í samsvar við sáttmálan, serliga grein 19 um sjálvstøðugt lív og rættin til at verða tikin við í samfelagið, og grein 4, stykki 1 f, um algilt snið.

[26] Cerebral Paresa (CP).

[27] Útbúgvingarskipanin í Føroyum er í høvuðsheitum býtt upp í kravdan 9 ára fólkaskúla, miðnámsskúla, handverksútbúgving og universitet.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

## 10. Heilsa (grein 25)

### 10.1 Avmarkingar vegna sjúkugreining (diagnosu)

Lógarrættindi í heilsuverkinum eru ofta avmarkað til bert nakrar fáar ávísar og staðiliga lýstar sjúkugreiningar og aldur, til dømis í mun til endurvenjing, viðlíkahaldsvenjing, menning, heilivág, samskifti og vælferðartænastur.

Myndugleikarnir hava fleiri ferðir skotið upp at avtaka slíkar avmarkingar við sjúkugreiningum, men higartil eru eingi tekin um ítøkiligar ætlanir ella vilja. Í frágreiðing síni til brekrættindanevndina hjá ST í 2014 settu umboðandi feløg orð á hesa avbjóðing, men tíverri var einki ítøkiligt tilmæli frá brekrættindanevndini hjá ST til føroyskar myndugleikar.

**Føroya landsstýri verður biðið um at**

a. *tryggja, at øll, ið bera brek, fáa neyðugar fjøltáttaðar vælferðartænastur og tilboð, t.d. til endurvenjing, viðlíkahaldsvenjing, heilivág, samskiftismenning ella aðrar vælferðartænastur, sum eru viðkomandi fyri heilsu og trivnað, eftir tørvi, og at hesar tænastur ikki eru avmarkaðar til staðiliga (positivt) defineraðar sjúkugreiningar (diagnosur).*

b. *tryggja, at heilsustarvsfólk, millum annað kommunulæknar, serlæknar og embætisfólk, hava viðkomandi og dagførda fakliga vitan at vegleiða og ráðgeva um viðkomandi heilsutænastur og at taka lut í menningini av viðkomandi heilsurættindum.*

### 10.2 Psykiatriska økið

Hóast Heilsumálaráðið gav út *Heildarætlan fyri sálarliga heilsu*[28] fyri menningina av psykiatriska økinum í 2018, so hevur henda heildarætlan ikki fingið ta umrøðu, sum hon hevur uppiborið. Tað er ein stórur tørvur á at raðfesta og menna psykiatriska økið, um Føroyar skulu megna at halda grein 25 í sáttmálanum á psykiatri- og heilsusálarfrøðiliga økinum.

***Føroya landsstýri verður biðið um at***

a. *lata upp skaðastovu til fólk, sum hava tørv á bráðfeingis sálarfrøðiligari hjálp.*[29]

b. *lata upp fyri lætt atkomuligum psykiatriskum viðgerðum og tænastum, tí í løtuni eru ov fáar viðgerðar- og psykososialar tænastur til fólk við sálarligum trupulleikum,*[30]

---

[28] www.hmr.fo/fo/kunning/tidindi/heildaraetlan-fyri-salarliga-heilsu-mugu-seta-okkum-framsoekin-mal ella https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/11577/120130-heilsu-og-innlendisma-lara-%C3%B0i%C3%B0-heildar%C3%A6tlan-innan-psykiatri_web.pdf [Vitjað hin 1. juli 2024]

[29] Í dag mugu fyrst til kommunulækna, sum síðani kann vísa tey á psykiatrisku depilin.

[30] Í dag noyðast tey flestu at fara til privatar sálarfrøðingar. Ein dýrur møguleiki, sum ikki øll hava ráð til og tí skapar ójavna atkomu. Harumframt høvdu skerjingar á almennu fíggjarlógini í 2023 við sær, at ein ókeypis sálarfrøðilig ráðgeving til ung í aldrinum 15-35 ár varð skerd til bara 15-25 ára aldursbólkin. Hetta var ein óheppin niðurlaging av eini skipan, sum annars hevði víst seg at virka væl.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

c. *at menna nøktandi geronto-psykiatriskar tænastur til eldri borgarar; serligar tvørgangandi avbjóðingar stinga seg upp, tá ið borgarar fylla 67 ár og flyta úr myndugleikaøkinum hjá landsstýrinum til kommunurnar og*
d. *menna nøktandi nýggjar fyribyrgjandi tænastur og átøk, herundir størri átøk at leita út fólki við álvarsligum sjúkum heima og hjálpa teimum at koma úr einsemi og fáa eitt betri lív.*

**11. Menning og endurmenning (grein 26)**

Tann 1. januar 2021 kom nýggj almannalóg í gildi í Føroyum.[31] Lógin er ein rammulóg og avbjóðingin er, at hon ikki er sett í verk við nøktandi fígging. Í Føroyum er eingin samkipað ætlan fyri menning og endurmenning. Til dømis fáa bert fólk við útvaldum sjúkugreiningum tilboð um viðlíkahaldsvenjing sambært almannalógini.

Sambært tænastupolitikkinum um almannatrygd, *Borgarin takast við uppá ráð*, frá 2017,[32] skulu allar tænastur til fólk, ið bera brek, sum koma undir málsræðið hjá Almannamálaráðnum, setast í verk við menning og endurmenning í huga. Hetta fevnir eisini um stuðulstænastur til børn og vaksin, bústovnar og viðlíkahalds- og endurvenjingartænastur, t.d. fyri Cochlear Implant (CI).

***Føroya landsstýri verður biðið um at***

a. *tryggja nøktandi fígging til nýggju almannalógina.*
b. *at seta í verk eina umfatandi fjøltáttaða ætlan við persónliga tillagaðum tænastum innan menning og endurmenning, og tiltøkum, lagað eftir tørvinum hjá tí einstaka, sum gera, at øll, sum bera brek, kunnu fáa og varðveita eitt so sjálvstøðugt lív, sum gjørligt, m.a. í mun til likamligar, sálarligar, sosialar og vinnuligar førleikar, inklusjón og luttøku í øllum lívsins viðurskiftum.*

**12 Arbeiði og starvssetan (grein 27)**

Á hesum øki eru eingi hagtøl eitt nú um, hvussu nógv fólk, ið bera brek, eru á arbeiðsmarknaðinum. Føroyar hava lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk,[33] sum fevnir um tillagingarstarvsskipan til fólk, ið bera brek. Eingin eftirmeting hevur tó verið av skipanini. Enn eru fordómar á arbeiðsmarknaðinum og samfelagnum yvirhøvur um at seta starvsfólk, sum bera brek, og avmarkað vitan er um teirra ymiskleika og um virðið á teirra arbeiðsførleika. Føroyar hava lóg sum bannar mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna brek,[34] men í

---

[31] Løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 154 frá 19. desember 2023

[32] *Borgarin takast við uppá ráð*. Teknisk frágreiðing og uppskot til politikk um almannatænastur til fólk, ið bera brek. Almannamálaráðið, 2017.

[33] Løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.

[34] Løgtingslóg nr. 63 frá 26. juni 2011 um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

lógini eru ongar ásetingar, sum áleggja arbeiðsgevarum skyldu at rímiliga tillaga arbeiðið í samsvari við sáttmálan.[35]

***Føroya landsstýri verður biðið um at***

a. *veita og menna neyðugu fakligu førleikarnar, dátugrunnar og greiningar fyri at varpa ljós á støðuna hjá fólki, sum bera brek á arbeiðsmarknaðinum; herundir í hvønn mun tey taka lut á arbeiðsmarknaðinum, og í hvønn mun neyðugt er við nýggjum átøkum at tryggja luttøku á arbeiðsmarknaðinum og menna førleikarnar at laga arbeiðið til fólk, ið bera brek.*
b. *sambært grein 8 í sáttmálanum at fáa í lag kunning og onnur tiltøk, sum hava til endamáls at niðurlaga fordómar um fólk, ið bera brek, og at økja um áhugan hjá arbeiðsgevarum at seta tey í starv.*

**C. Serligar skyldur (greinar 31-33)**

**1. Hagtals- og dátuinnsavning (grein 31)**

Samanumtikið mangla týðandi hagtøl og gransking á brekøkinum, sum kunnu nýtast til ætlanir, lógarsmíð og eftirlit. Dátur og hagtøl úr Danmark fevna ikki um viðurskiftini í Føroyum, so sera avmarkað vitan er tøk. Fleiri umboðandi feløg eru eisini vitni til, at familjur og avvarðandi eru í øktum vanda fyri at fáa sálarligar avbjóðingar sum strongd og tunglyndi. Hagtøl mugu savnast og greinast skjótast gjørlig í samsvari við *Washington Group on Disability Statistics*.

***Føroya landsstýri verður biðið um at***

a) *skipað og fíggja innsavning, greining og útbreiðslu av hagtølum, sum eru býtt sundur eftir kyni, aldri, fíggjarligari støðu og øki, umframt breki, í samsvari við Washington Group on Disability Statistics og í tráð við tilmælini hjá nevndini frá 2014 (nr. 65); og*
b) *at eggja, breiða út og stuðla gransking og útbreiðslu av gransking á brekøkinum, fólki við breki, og umsorganarfólki hjá fólki, ið bera brek.*

**2. Innlendis ígildisetan og eftirlit (grein 33)**

Samanumtikið kann sigast, at ásetingarnar í grein 33 í sáttmálanum eru bert í sera avmarkaðan mun settar í gildi í Føroyum.

**2.1 Samskipandi eind (grein 33, stykki 1)**

MEGD metir, at samskipandi eindin innan brekøkið als ikki hevur verið virkin, og at myndugleikarnir hava víst avmarkaðan áhuga fyri at gera hesa eindina virkna.[36]

---

[35] Sí omanfyri undir B.1.2. og tilmælini. Føroya landsstýri lýkur sostatt ikki myndugleikans skyldu sambært grein 5, stykki 3, í sáttmálanum, í sambandi við grein 4, at stuðla undir at útvega rímiligar tillagingar á arbeiðsmarknaðinum.

[36] Í aðru og triðju frágreiðing frá danska kongsríkinum til brekrættindanevndina í 2020 (sí stykki 381) boðaði landsstýrið frá, at ein samskipandi eind var sett á stovn í 2019 við tí endamáli at fremja sáttmálan í verki, og at gongd var sett á fyrireikingarnar at gera eina tvørgangandi brekpolitiska virkisætlan, sum skuldi vera klár í 2021.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*styrkja átøkini á hesum øki, soleiðis at Føroya landsstýri setur eina samskipandi eind innan brekøkið sambært grein 33, stk. 1, sum í samstarvi við sivilsamfelagið og umvegis samstarv og samskipan millum geirar og ymisk samfelagsstig, kann vera við til at fremja rættindi í verki.*

**2.2 Eftirlitseindin (grein 33, stykki 2)**
Fyrr í ár samtykti Føroya løgting eina lóg, ið setur á stovn eina grein 33 eind undir útinnandi valdinum at hava eftirlit við sáttmálanum, sum eftir ætlan byrjar sítt virksemi 1. januar 2025.

MEGD hevur mælt til, at eftirlitseindin verður sett uttanfyri útinnandi valdið á sama hátt sum og við leysum tilknýti til løgtingsins umboðsmann, hetta fyri at tryggja óheftni í samsvar við grein 33, stykki 2.[37]

MEGD hevur eisini gjørt vart við samansetingina av nevndini fyri eftirlitseindina, har umboðandi feløg bert fáa ein av tilsamans 7 limum[38] til tess at tryggja samsvar og virðing fyri París-meginreglunum.

Eftirlitseindin fer eisini at hava eitt avmarkað tal av starvsfólki, kanska tvey fólk tilsamans, og enn er ikki víst, um hon fer at hava neyðugan serkunnleikan og ta fígging, ið krevst.

Heitið *Brekumboð* er óheppið og avspeglar gamla hugsanarháttin um fólk, ið bera brek. MEGD hevur tískil mælt til eitt betri heiti, *Brekrættindaumboð*, sum endurspeglar meira framkomnu mannarættindahugsanina.

***Føroya landsstýri verður biðið um***

a. *sambært grein 33, stykki 2, í sáttmálanum og tilmælunum hjá nevndini frá 2014 (nr. 67) at tryggja, at eftirlitseindin fær neyðuga óheftnið, nøktandi fígging, fakligan serkunnleika, og samstarv við umboðandi feløg, og alt í samsvari við París-meginreglurnar og*
b. *taka stig til at broyta heitið á grein 33, stykki 2, eftirlitseindini, frá Brekumboð til Brekrættindaumboð.*

**2.3 Luttøka í sivilsamfelagnum (grein 33, stykki 3)**
Av tí at samskipandi eindin og eftirlitseindin higartil hava verið avmarkað, óvirkin ella ikki til, sí omanfyri, hava Føroyar ikki hildið grein 33, stykki 3, í sáttmálanum. Harumframt er umráðandi, at myndugleikarnir veita umboðandi stovnunum neyðugan fíggjarligan stuðul til at luttaka í eftirlitsarbeiðinum á fakliga kvalifiseraðum grundarlagi sambært sáttmálanum og almennu viðmerking nr. 7 hjá brekrættindanevndini.[39]

---

[37] Hetta er við mannarættindastovnunum í m.a. Noregi og Finlandi sum fyrimynd. Uppskotið varð ikki tikið til eftirtektar og endaliga staðsetingin er ikki avgjørd enn.

[38] Partarnir á arbeiðsmarknaðinum fara at hava hvør sítt umboð, meðan hinir fýra limirnir umboða ymsar almennar myndugleikar.

[39] Almenn viðmerking nr. 7 hjá brekrættindanevndini hjá ST frá 2018. UNCRPD General Comment No. 7 (2018). Sí t.d. brot nr. 60 um fígging yvirhøvur og nr. 39 um grein 33, stk.3, í sambandi við 4, stykki 3.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

***Føroya landsstýri verður biðið um at***
*tryggja, at feløg, sum umboða fólk, ið bera brek, á skipaðan hátt eru við í lógarsmíði og hava førleikar at luttaka fult í eftirlitinum við, at sáttmálin verður framdur í verki sambært grein 33, stykki 3, og at feløgini fáa neyðuga fíggjarliga orku og serkøn starvsfólk at røkja hesa uppgávu.*

Skjal stovnað 20. mars 2024 / mol_dh
Mál 14-2023-00437 - skj. 653433



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo